Álit

í

løgtingsmáli nr. 104/2020: Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m. (Heimild at skjóta grágás, treytir fyri at fáa loyvi til tess, ásetingar um kanningar og vísindaligar teljingar og lógartøkniligar og málsligar rættingar)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð tann 15. mars 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 13., 15. og 23. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Føroya Bóndafelag, Veiði- og skjótifelag Føroya, Búnaðarstovuna, Tjóðsavnið, Mentamálaráðið og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjørt Samuelsen, Jákup Mikkelsen, Johan Dahl, Beinir Johannesen, Henrik Old og Bjarni Kárason Petersen) hevur hesar viðmerkingar:

Hóast neyvar metingar av grágásastovninum ikki finnast, so bendir nógv á, at stovnurin hevur staðið í stórum vøkstri seinastu árini. Tað slepst ikki undan, at gásin ger skaða á velt lendi, tá hon í stórum tali legst á bø og veltur. Royndir gjørdar á Búnaðarstovuni, og royndir hjá fleiri bóndum vísa, at skaðin kann vera rættuliga umfatandi við stórum fíggjarligum missi fyri bóndan. Heimildin at skjóta grágás verður eftir umsókn givin teimum, ið eiga ella leiga velt lendi, og sum kunnu dokumentera, at gásin ger skaða á lendið.

Higartil hevur tað verið Búnaðarstovan, sum letur loyvini, og sum stendur fyri skráseting av skotnum fugli. Undir viðgerðini er komið fram, at skrásetingin av skotnum fugli er óneyv, og at helst verður stórur partur av skotna fuglinum ikki skrásettur. Hetta sæst aftur í tølunum, sum vísa, at ímeðan tað í 2014 vóru skrásettar 266 skotnar gæs, so var talið einans 24 gæs í 2017 og 39 gæs í 2019, sum er seinasta árið nevnt í viðmerkingunum. Meirilutin heldur, at kravið um at boða frá, hvussu nógvar gæs verða skotnar, eigur at verða hildið, tí tað er ein av fyritreytunum fyri at kunna gera stovnsmetingar.

Við §17 b verður við lóg álagt landsstýrismanninum at stíla fyri, at kanningar og vísindarligar teljingar verða framdar. Meirilutin ivast eitt sindur í, hvørt Búnaðarstovan er rætti stovnurin til at umsita vísindaligar teljingar av fugli.

Vinnunevndin vísti í áliti til løgtingsmál nr. 59/2020 um fuglateljingar á, at "neyðugt er at savna fakøkið fuglatelingar, men eisini skráseting, dátusavning og gransking av náttúrumargfeldinum sum heild. Í dag er uppgávubýtið spjatt og ikki minst liggja dátur sera spjaddar, og mest møgulig nytta fæst tí ikki úr tí arbeiði, sum gjørt verður."

Meirilutin skjýtur tí upp at geva landsstýrismanninum heimild at leggja hetta arbeiðið til annan myndugleika, og verður her hugsað um fyrrverandi Náttúrugripasavnið, sum í dag er Tjóðsavnið,

ella Havstovuna, sum hvør í sínum lagi granska og savna náttúrudata, undir hesum skipaðar fuglateljingar, í tann mun fíggarorka er til tess. Umhvørvisstovan er eisini ein møguleiki.

Grágásin var nærum útdeyð miðskeiðis í áttatiárunum, og varð hon tí friðað. Grágásin er eisini fevnd av Bonn-sáttmálanum um ferðandi fuglastovnar og AEWA-avtaluni um verju av ávísum fuglasløgum; sáttmálar, sum Føroyar hava tikið undir við.
Tá loyvi aftur varð givið til avmarkaða skjóting av grágásini, varð hetta gjørt undir teirri fyritreyt, at skipaðar teljingar av stovninum skuldu setast í verk. Tíverri er hetta enn ikki gjørt. Hetta kostar á leið 60 tús. kr. árliga í fimm ár, og er sostatt ein yvirkomulig upphædd.

Øll villgásasløg eiga at verða tald, tí fleiri gásasløg eru í Føroyum. Fuglateljingin er neyðug fyri á burðardyggum grundarlag at loyva avmarkaðari skjóting og í framtíðini kanska eisini veiðu av fleiri gásasløgum.

Í viðmerkingunum stendur, at loyvi verður givið til at skjóta grágás fyri at drepa ella styggja gás á veltum lendi. Meirilutin vísir á, at tá loyvi verður givið at skjóta, skal tað vera fyri at drepa. Skjóting fyri at styggja kann føra til nógvan lamskotnan fugl, og tað er ikki er samsvari við góða røkt av djórum.

Meirilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 12 verður í § 17 a, stk. 1 aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
   "Landsstýrismaðurin kann áseta eitt ovara mark fyri talið á grágás, sum skjótast kann."

2. Í § 1, nr. 12 verður í §17 b aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
   "Landsstýrismaðurin kann eftir avtalu við viðkomandi landsstýrismann leggja uppgávurnar nevndar í 1. pkt. til ein annan myndugleika undir avvarðandi landsstýrismanni at umsita."

Viðmerkingar:
Til nr. 1: Landsstýrismaðurin fær í §17 b álagt skyldu at stíla fyri, at kanningar og vísindaligar teljingar av grágás verða framdar. Við støði í hesum kanningum kann landsstýrismaðurin seta mark fyri talið á fuglum, sum loyvi er at skjóta, um mett verður, at gingið verður stovninum ov nær.

Til nr. 2: Skráseting og vísindaligar teljingar av fugli eigur at verða framt av myndugleika, sum vanliga umsitur slíkar uppgávur.
Tískil fær landsstýrismaðurin heimild til at flyta hesa uppgávu eftir avtalu við annan landsstýrismann yvir á annan myndugleika undir avvarðandi landsstýrismanni at umsita.

Við hesum broytingum tekur meirilutin undir við málinum, og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið

Minnilutin (Bjarni Hammer) hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at verja grøðina. Tí gevur tað lítla meining, um loyvi ikki verður givið at skjóta gás, tá grasið stendur.

Hetta er eitt vinnumál og tí er fatanin, at endamálið átti at verið at verja grøðina og ber tað ikki til at verja grøðina, meðan hon er har, so tænir uppskotið ikki endamálinum hjá sær sjálvum.
Nevndin hevur fingið upplýst, at gásin ikki er í velta bønum, tá hon bølir. Tá er tað ungfuglur, ið ger skaða á velt lendi.
Tí tænir tað ikki endamálinum, um tað ikki verður møguligt at verja grøðina tá grasið stendur.

Í Føroyum eru fleiri sløg av villari gás; tí vil hetta lógaruppskotið vera í so avmarkað, um tað einans umfatar grágás. Tað er alment kent, og kom eisini fram undir viðgerðini, at grágæs bert eru ein partur av gæsnum, ið gera skaða á velt lendi í Føroyum. Skaða gera eisini eitt nú brandgás, íslandsgás, óshvít gás, v.m. Heimildin eigur tískil at verða broytt til "villgás", ístaðin fyri grágás. Umsitingin metir tað ikki vera gjørligt at gera hesa broytingina í lógaruppskotinum, vegna identitet. Á Sandi er tað brandgásin, sum hevur fingið fastatøkur. Brandgásin nørist við fullari ferð, og er til óbótaligan skaða á grøðina í Sandoynni. Tað er av alstórum týdningi, at loyvi verður givið at skjóta brandgás, ið setur seg á velt lendi. Um ikki aðrastaðni, so má loyvi gevast í Sandoynni.

Bøndur, sum hava stóran ampa og stórt fíggjarligt tap av gásini, hava frammanundan ríkiligt at takast við. Tí er tað fáur, sum jagstrar gæs av bønum til stuttleikar. Tað rænir dýrabara tíð, sum kundi verið brúkt til dagligan rakstur, men tað er neyðugt fyri at bjarga og verja grøðina.

Tað er eisini eitt øðrvísi fíggjarligt sjónarmið í hesum, sum vit ikki geva okkum far um. Tað er tann beinleiðis stuðulin sum fer av landinum, m.a., av tí skaðanum, sum villgásin ger á lendið í Føroyum.

Gásin fremur stóran skaða á lendið við at traðka og eta, bæði epli, gras, røtur o.a. Bóndin er noyddur at keypa eyka nøgdir av kostnaðarmiklum kunsttøðum, framleitt í m.a. Hollandi og Onglandi. Av tí at gróðurin als ikki verður líka góður, sum hann kundi verið, um gásin ikki var í bønum, so má bóndin eisini keypa eyka gras og hoyggj, eisini framleitt uttanlands. Gásin flýgur til júst hesi somu lond og blívur skotin. Ein serlig og samstundis keðilig ringrás, sum ferð aftaná ferð endurtekur seg.

Tað er umráðandi, at bøndur lættari kunnu fáa hjálp at styggja gásina burtur. Verandi lóg loyvir øðrum, ein í senn, at koma inn á festini við loyvi frá landsstýrismanninum og bóndanum.
Veiði- og Skjótifelag Føroyar vísir á, at teirra limir eru vandir skjúttar, hava førleikar og áhuga í at hjálpa til. Tað kann eisini verða við til at minka um lamskotnan fugl.

Tá villgásasløgini eru tald, og stovnsmetingar eru gjørdar, eigur landsstýrismaðurin at kanna møguleikan fyri burðardyggari veiðu av villgás í Føroyum.

Ein møgulig veiða av villgás skal sjálvandi regulerast við greiðum reglum og treytum, við hámarki fyri, hvat hvør einstakur kann veiða, og hvussu nógv kann takast úr stovninum. Krøv skulu tá setast til førleikar hjá veiðifólki, teirra kunnleika til ymsu fuglasløgini o.s.fr.

Tað er umráðandi, at vit á skilabesta hátt varðveita føroysku veiðimentanina, sum við fleiri og fleiri forðingum er í vanda fyri at doyggja út.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum, og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið

Vinnunevndin, 26. apríl 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	